

*Anna og Símun*



*Á útferð til Kollafjarðar við ferguni hjá Tom. Her eru tey avmyndað uttanfyri barndómsheimið hjá Onnu.* ***Frammanfyri f.v.*** *Súsanna, mostir Onnu, frk. Norholdt, Tom, Anna sjálv og Suffía, mamma Onnu.* ***Frammanfyri:*** *Sanna í Gong og Rosa, gift við fostursoni Niclas, mammubeiggja Onnu*



*Avhaldið var ein miðdepil í Havn. Mynd hjá Fornminnissavninum*



*Anna við seymimaskinuni 94 ára gomul*

plagdi at fortelja søgur fyri børnunum. Hetta var eisini sera hugnaligt. Tey vóru mestsum grannar við Landavegin.

Thorshavn Totalafholdsforening varð stovnað í 1878, og eldsálin í hesum var sum á so nógvum øðrum økjum Djóni í Geil, hann gjørdist eisini fyrsti formaður.

Tað var eisini hetta felag, sum av fystu tíð gav fráhaldsblaðið Dúgvuna út, og Djóni gjørdist eisini blaðstjóri. Tað er ikki fyrr enn í 1910, tá Djóni var blivin illa sjúkur, at losjan helt áfram við blaðnum.

Losja verður stovnað í Havn í 1902. Hetta er vegna ónøgd við avhaldsfelagið, har fráhaldslyfti bert skuldi gevast fyri 3 mánaðir í senn. Sum frá leið gjørdist tað losjan, sum kom at mynda fráhaldsrørsluna í Havn, men avhaldsfelagið hevði stóran týdning ta tíð tað var.

Jørgen, beiggi Onnu og Marthu, var serliga virkin í Avhaldsfelagnum og seinni í losjuni. Men hann var kortini eisini trúfastur móti Avhaldsfelagnum, sum vist enn er til á pappírinum.

## Anna gerst vaksin

Men tíðin gongur, og tann 11. april 1915 verður Anna konfirmerað av Jákupi Dahl, prósti. Hetta gekk tá framvegis fyri seg á donskum. Tað vóru bert 18 konfirmantar, 15 úr Havn, og hinir vóru úr Nólsoy og Velbastað. Vanliga vóru tað fleiri konfirmantar á heysti enn á vári. Millum konfirmantarnar saman við Onnu var Knút Petersen, kendur sum skómakari. Nógv ár seinni giftust barnabørn hjá teimum báðum, nevniliga dóttir Onnu hjá Knút og sonur Bergtóru hjá Onnu.

Genturnar vóru tá allar í svørtum kjóla. Men tær vóru tá byrjaðar frammanundan at vera í hvítum. Hetta sæst í Havnabókini hjá Birgar. Her sæst eisini, at allar genturnar høvdu beinan reik, tá ið Anna varð konfirmerað. Hetta man hava verið móti tá. Dreingirnir høvdu stíva flipp, men nakrir vóru í matrósaklæðum.

Men nú var at fáa nakað at gera. Fyrsta arbeiðið hjá Onnu var, at hon fór til Lauridsen, danska yvirlæraran við realskúlan, at vera morgungenta. At vera morgungenta merkti, at hon arbeiddi frá kl. 8 á morgni til kl. 1 seinnapartin. Lønin var nú ikki tann heilt stóra, nevniliga 5 kr. um mánaðin. Ein av uppgávunum var at bera morgunmat í realskúlan til Lauridsen. Her kom Anna at arbeiða saman við pápa sínum, sum var fyrsti pedellurin við realskúlan til eina løn, sum var 85 kr. um mánaðin. Tað, at tey arbeiddu saman, merkti eisini, at tey hjálptu hvørjum øðrum.

## Tá høggijarn mátti brúkast til sukrið

Síðan kom Anna at arbeiða hjá Poul Restorff, sum hevði handil í grannalagnum hjá Onnu. Hetta hevur neyvan verið heilt tilvildarligt. Mamma Onnu tænti sum ung hjá gamla Restorff, og tað hevur verið eitt tætt samband millum familjurnar. Besta prógvið fyri hesum er, at Martha, systir Onnu, er uppkallað eftir Martin, sum var ein beiggi Poul Restorff, sum doyði ungur. Handilin hjá Poul er í dag PE-handilin í Sigmundargøtu.

Breyðprísirnir vóru ikki teir somu sum í dag. Teir vóru 40 oyru fyri rugbreyð og 20 oyru fyri franskbreyð.

Millum vørurnar í handlinum, sum ikki eru kendar í dag, vóru sukurtoppar. Teir vóru kanska dupult so stórir sum eitt krúss, og teir máttu høggast sundur við høggijarni.

Restorff-familjan var yvurhøvur kend fyri sín tónleik. Tað, sum Anna mintist til tónleik, var, at mamma Poul, Sofía Helena, hevði klaver í stovuni. Pápi hennara var annars Jørgen Frands Jacobsen, sum var abbi rithøvundan av sama navni. Jørgen Frants varð føddur í 1819 og doyði í 1917, 97 ára gamal.

Jørgen Frands var eisini langabbi William Heinesen. Anna plagdi at síggja hann niðri í Vágsbotni. Tað sigur nakað um hennara aldur, at hon mintist langabba William Heinesen, sum varð føddur meira enn 185 ár áðrenn, hon sjálv doyði.

Sofía Helena var omma William Heinesen, og var av honum í eini stuttsøgu umrødd sum "min romantiske bedstemor". Hesir Restorfarar eru allir umrøddir í røðini Hendur ið Sleptu.

## Anna sum fotografur

Anna hevði fyri eina unga gentu tá í tíðini sjáldsaman áhuga fyri at fotografera.

Oluffa, systir Onnu, arbeiddi í gamla bókhandlinum, og har keypti Anna eitt kassafototól fyri 18 kr.

Her skal skoytast uppí um Oluffu, at hon giftist ongantíð, hóast nógvir dreingir lógu framvið. Bróðursonurin Heri Mørkøre hitti eina ferð ein eiðismann, sum kom eftir sambandinum teirra millum. Hesin hevði gingið á skiparaskúla, og hann fortaldi fyri Hera, at tað vóru "nógvir blýantar keyptir til svart onga nyttu" frá Oluffu í bókahandlinum!

Anna keypti so eisini framkallaratól, og hon keypti løgin til framkallingina í bókhandlinum. So dró hon gardinurnar fyri, og tá var kamarið hjá henni eitt myrkakamar, og hon kundi framkalla tiknu myndirnar. Í myrkakamarinum hevði hon petroleumslampu við reyðum lampuglasi. Tað er óneyðugt at siga, at hesar myndir, hon hevur tikið, eru ein dýrgripur í dag, sum eisini okkara lesarar fáa høvi til at ásanna.

## Fór niður á handarbeiðsskúla

Men sum frá leið mátti Anna gevast at arbeiða úti. Mamman mátti hava hjálp, so hvørt tað komu fleiri systkin. Tískil mátti Anna heim at hjálpa til.

Men Anna varð forlovað heilt ung, og hon vildi royna nakað, áðrenn hon bant seg. Hetta var sera vanligt hjá ungum gentum tá í tíðini.

Í 1924 fór hon niður á Husflidsskolen, sum var í Gothersgade 125 stutt frá Nørreport í Keypmannahavn. Anna var sera fitt í hondunum og hevði hug at fáa sær eitt slag av útbúgving innan hetta økið. Anna hevði sjálv spart sær saman til hetta. Tað var latið tvey pláss til føroyingar á hesum skúla hvørt ár. Hin, sum fór niður hetta árið, var Tulla, dóttir Ludvig Poulsen, blikkinsláara. Tulla giftist seinni við Ísaki Petersen, skómakara. Ein sonur teirra var Dánjal í Skóbúðini, sum doyði fyri nøkrum árum síðan. Tær fóru niður við "Sleipner" hjá DFDS. Á vegnum niður varð lagt lagt inn í Leith, sum lá á leiðini. Skúlin vardi fimm mánaðar. Her lærdu tær ymisk handarbeiði sum at knipla, brodera og at seyma hattar. Aftaná skúlan fór Anna upp aftur við "Sleipner". Aftaná 80 ár sat Anna framvegis og bant. So ein kann ætla, at tað er ikki smáting, sum liggur eftir hana á hesum økinum.

## Forlovað 16 ára gomul

Nú var Anna komin í giftingaraldur. Hon hevði upplivað eitt sindur av hvørjum og var búgvin at binda seg. Hon og Símun høvdu gingið saman í 8 ár. Hon var bert 16 ár, tá tey funnu saman. Hetta var sera ungt, men kanska ikki heilt óvanligt. Tey ungu høvdu síni "stevnumøti" og fóru svermitúrar oman eftir Áarvegnum og niðan eftir Amtmannsbrekkuni. Onkuntíð varð farið út á Skansan.

Í dag bjóða dreingirnir gentunum hjá sær ein biltúr. Hetta bar ikki